Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Bíðitíðin at skifta mjødn

Spurningar:

1. Hvussu long er bíðitíðin at skifta mjødn?
2. Er nøkur ítøkilig ætlan at stytta um bíðitíðina?
3. Hvussu ber tað til, at mjadnaskurðviðgerðir ofta verða útsettar?

Viðmerkingar:
Øll, ið hava bíðað eftir viðgerð, vita, at bíðitíðin oftast kennist drúgv. Tá viðgerðir ferð eftir ferð verða útsettar, kann hetta hava álvarsamar avleiðingar. Dømi er eitt nú um, at mjadnaskurðviðgerð, ið skuldi vera í februar í ár, er útsett upp til fýra ferðir og verður nú væntandi ikki fyrr enn í novembur í fyrsta lagi.

Tá skurðviðgerðir verða fluttar, kann tað hava stórar avleiðingar fyri sjúklingin. Møguliga kropsligar, men eisini sálarligar, arbeiðsligar og sosialt. At skifta mjødn er sjáldan partur av eini lívshættisligari sjúku; men verður farið um 52 vikur, og talan ikki er um lívshættisliga sjúku, so hevur sjúklingurin ikki longur rætt til dagpening, hóast viðkomandi enn ikki er arbeiðsfør/ur. Haraftrat kann sjúklingurin verða uppsagdur, um sjúkrameldingin fer út um 120 dagar.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 24. august 2022

Ingilín D. Strøm